# Caroll og Rooney í álopinum

**FÓTBÓLTUR Enski landsliðsvenjarin, Fabio Capello heldur, at hann loksins hevur funnið tað rætta álopsparið til tað enska landsliðið**

Heri Simonsen

Andy Caroll hevur havt eina ótrúliga góða kappingarbyrjan við Newcastle. Higartil hevur hann skotið átta mál í Premier League, og tað hevur eisini ført til, at hann hevur fingið sín fyrsta dyst á tí enska landsliðnum.

Enski landsliðsvenjarin, Fabio Capello heldur, at Andy Caroll saman við Wayne Rooney fer at verða eitt ógvuliga vandamikið álopspar hjá tí enska landsliðnum.

– Eg trúgvi, at teir báðir verða ein góð samanseting. Caroll er ikki bara sterkur við høvdinum, hann hevur eisini skjótar og smildligar rørslur, sum gevur hinum spælarunum rúm, sigur Fabio Capello við kenda enska blaðið, The Guardian.

Fabio Capello hevur leitað leingi eftir einum sterkum framherja, sum kann spæla saman við Wayne Rooney í tí enska álopinum. Men hvørki Emile Heskey ella Peter Crouch hava víst nóg góðar dygdir.

Fabio Capello fegnast eisini um, at Wayne Rooney er byrjaður at spæla aftur: – Tá Wayne Rooney er í góðum formi, so er hann uttan iva ein av heimsins bestu fótbóltsspælarum. Hann er ein av teimum spælarunum, sum veruliga ger mun, tá hann er á vøllinum. Tá hann ikki er við okkum, tá gerast vit eitt nógv tamari lið, staðfestir Fabio Capello.

# Herlig West Ham viðhaldsfólk

**FÓTBÓLTUR Tað gongur einki serligt hjá West Ham í ár. Teir liggja niðast, og liðið spælir eisini illa. Leygarkvøldið vóru teir á vitjan á Anfield, og West Ham spældi kanska verri enn teir plaga**

Tróndur Arge - Liverpool

Liverpool hevði lætt spæl og vann 3-0. West Ham viðhaldsfólkini megnaðu tó at halda lív í og skapa ein góðan stemning gjøgnum allan dystin.

Stutt eftir, at Liverpool í fyrra hálvleiki hevði lagt seg á odda, royndi Victor Obinna seg við skoti úti frá. Bólturin fór himmalhøgt uppum.

»That's why we are going down, that's why we are going down« *(Hatta er tí vit flyta niður)*

Byrjaðu øll West Ham viðhaldsfólkini syngja og tað fekk restina av áskoðarunum á Anfield at smíla og flenna.

West Ham-viðhaldsfólkini syngja vanliga um, at tey eru ávegis til Wembley, men við hetta høvið høvdu tey skift »Wembley« út við »Coventry«, sum ein staðfesting av, at tey ikki trúgva upp á betri tíðir. Coventry spælir í næstbest deildini í Onglandi.

Fyri einari viku síðan tapti Liverpool móti Stoke og nøkur viðhaldsfólk byrjaðu at rópa; »Dalglish, Dalglish«, við tí fyri eyga at fáa Kenny Dalglish at taka yvir venjarastarvinum hjá Roy Hodgson. Hesa ferð vóru tað West Ham viðhaldsfólkini, ið vildu hava nýggjan venjara. Tey sungu; »Paolo Di Canio, Paolo De Canio«. Italskí framherjin spældi í West Ham frá 1999 til 2003 og er høgt virdur millum viðhaldsfólkini.

Herðaklapp til West Ham viðhaldsfólkini fyri at undirhalda á Anfield, hóast West Ham spældi ein vánaligan dyst.



*B68-veteranurin við tí framúrskarandi vinstrabeininum, Øssur Hansen, hevur takkað fyri seg í føroyskum fótbólti*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Seinasta heilsanin

**FÓTBÓLTUR – Spyrjið, hvat eg kann gera fyri felagið, og ikki, hvat felagið kann gera fyri teg, er áheitanin frá Øssuri Hansen til fótbóltsleikararnar á Toftum, nú fyrrverandi landsliðskempan hevur takkað fyri seg**

Uni Holm Johannesen

Øssur Hansen spældi sín seinasta landskappingardyst í fremstu røð tann 18. oktober í ár.

Ein av stóru profilunum í føroyskum fótbólti í samfull 23 ár takkaði tá fyri seg.

Toftamaðurin spældi fyri fyrstu ferð í bestu deildini í 1987. Hann hevur spælt flestu dystirnar fyri B68, og hann hevur vunnið serstaka støðu á Toftum.

Umvegis heimasíðuna hjá Tofta Ítróttarfelag, takkar Øssur Hansen nú fyri fótbóltsárini á Toftum.

– Eg eri takksamur fyri, at tit gjørdu mín seinasta leikdag til nakað heilt serligt fyri meg. Eg vil takka tykkum fyri tíðina, eg havi verið í felagnum, meðan tit hava sitið sum nevnd. Eg vil eisini takka øllum fyrrverandi nevndum, sum hava sitið undir mínum tíðarskeiði sum fótbóltsspælari, skrivar Øssur Hansen á B68.fo.

## Venjarin fær eina tøkk

Bill M. Jacobsen, sum hevur stjórnað besta mansliðnum hjá B68 seinastu árini, fær eisini eina heilsan.

– Takk fyri ta tíð, sum eg spældi, við tær sum venjara. Eg haldi, at tú er ein venjari, sum er væl fyrireikaður til venjingarnar og taktikfundirnar, og tað er nakað, sum spælarar dáma væl. Eg eri eldri enn tú, so tað var kanska ikki altíð so lætt at seta meg upp á pláss. Eg vil takka tær fyri, at tú er ein venjari, sum skilir, at ein spælari hevur familju og kann ikki altíð fara til venjingar. Tað hava verið dømir um útlendingar, sum als ikki góðtaka nakra fráveru. Vónandi vinnur tú teg upp á ovastu rók við B68. Um ikki við okkum, so vónandi við onkrum øðrum – bara ikki við einum ávísum liði innanfyri, skrivar Øssur Hansen.

## Spyrjið, hvat tú kann

Øssur Hansen hevur eisini eina áheitan til fótbóltsleikararnar á Toftum, sum komandi árini skulu mynda besta mansliðið.

– Spyrjið, hvat eg kann gera fyri felagið, og ikki, hvat felagið kann gera fyri teg, skrivar hann og leggur afturat:

– Tað hevur verið eitt sonn uppliving at spælt við tykkum. Eg haldi, at tit eru ótrúliga seriøsir, viljasterkir og hava tann eginleikan, at tit geva ikki upp fyrr enn dómarin hevur bríksláð fyri seinastu ferð. Haldið fram við at trúgva upp á tykkara eginleikar, og ikki minst, at tit kunnu vinna móti einum og hvørjum liði, slær Øssur Hansen fast.

*uni@sosialurin.fo*